# Sølan av óvirkaðum fiski setur met

**Næstan tveir triðingar av hýsuni frá feskfiskaflotanum vórðu í fjør seldir útlendskum keyparum, sum óviðgjørdur feskur fiskur. Hægri prísur lokkar skipini at selja uttanfyri landoddarnar**

FISKASØLA



Ongantíð áður er so lítil partur av feskfiskaveiðuni endaður á flekiborðunum. Í fjør varð góður triðingur av veiðuni av feskum toski, upsa og hýsu seldur av landinum sum ísaður fiskur. Tað vísa nýggjastu veiðihagtølini í Hagtíðindum.

Feskfiskaskipini førdu um 105 000 tons av toski, hýsu og upsa til lands í fjør. Ein triðingur – ella góð 35000 tons – vórðu annaðhvørt avreidd uttanlands ella útflutt óviðgjørd. Vit skulu aftur til 1996 fyri at finna tøl sum eru nærhendis hesum. Tá fóru 21 000 tons – ella 32% óvirkað av landinum.

### Mest hýsa

Serliga er tað fesk hýsa, sum í stórari nøgd verður seld, uttan at verða góðska her heima.

Av 25 000 tonsum av feskari hýsu, vórðu 20 000 tons avreidd í Føroyum, men helvtin varð seld beinleiðis víðari til útlendskar keyparar. Við hýsuni, sum varð avreidd uttanlands, vórðu til samans
15 000 tons av feskari hýsu seld útlendingum óvirkað.

Tað er næstan 60 prosent, og meira enn dupult so nógv, sum tað ið fór av landinum óvirkað í 2000.

### Upsi og toskur

Útlendingar keyptu eisini ein góðan fjórðing – 26% - av feska upsanum í fjør. Ein fimtipartur varð avreiddur uttanlands, meðan føroyskir fiskakeyparar seldu ein minni part víðari.

Fyri trimum árum síðani vórðu 96% av feska upsanum virkaði á flakavirkjunum, meðan einans 4% vórðu seld óvirkað.

Eisini ein fjórðingur av toskinum fer óvirkaður av landinum – 23 %. Hetta er eitt sindur minni enn í fjør.

### Betri prísur lokkar

Tað er serliga tá meira fæst fyri fiskin í skotskum, donskum og øðrum havnum, enn í Føroyum, at meira fiskur fer óviðgjørdur av landinum. Hagtølini vísa, at fyri tosk og hýsu er heilt greiður samanhangur ímillum, hvussu stórur munur er á prísinum uttanlands og í Føroyum, og hvussu stórur partur av fiskinum verður útfluttur óvirkaður.

## Børn í kanningum

Tríggjar mánaðar gomul smábørn og eldri børn hava verið við í møguliga vandamiklum royndum við heiligvági. Hetta skrivar bretska blaðið The Observer í gjár.

Sambært blaðnum hevur fyritøkan GlaxoSmithKline síðani 1995 stuðlað minst fýra royndum við AIDS-heiligvági, har hiv-smittað børn hava verið við. Endamálið við royndunum var at royna trygd og skamting av heiligváginum. Børnini, sum vóru við í royndunum, vóru øll foreldraleys børn, sum búðu á einum katólskum viðgerðarheimi í New York. Heilsumyndugleikarnir í amerikanska býnum eru nú farnir at kanna málið.

## Nýggj norðurlendsk kapping

Ein nýggj norðurlendsk fótbóltskapping verður nú veruleiki. Á einum tíðindafundi í gjár varð staðfest, at tey bestu feløgini í Danmark, Svøríki og Noregi fara at kappast í eini nýggjari kapping, sum hevur fingið navnið Royal League.

Kappingin byrjar 20. november, og tað verða fýra tey bestu feløgini í hvørjum landi, sum verða við. Finalan verður í apríl mánaði næsta ár.

Fótbóltssambondini í Danmark, Svøríki og Noregi hava tikið stig til nýggju kappingina, sum eisini hevur fingið viðurkenning frá UEFA.

Ætlanin var, at vinnarin av kappingini skuldi fáa pláss í UEFA Cup, men hetta verður ikki veruleiki í fyrstu syftu. Tað verður tó nakað, sum norðurlendsku fótbóltssambondini fara at arbeiða fyri.

## Todi aftast í røðini



Todi Jónsson er í løtuni at finna aftarliga í røðini av álopsspælarum hjá FC Keypmannahavn. Skírsdag skal FCK spæla steypadyst ímóti Skive, og hóast fýra álopsspælarar vórðu tiknir út til dystin, so var Todi ikki millum teirra. Zuma, Santos, Peter Møller og Jesper Bech fingu hinvegin allir boð til dystin.

– Tað vil við øðrum orðum siga, at í løtuni eri eg fimti maður í álopinum. Men tað nyttar einki at fara niður við nakkanum. At súrmúlast og missa mótið gagnar einki. Eg royni at stríðast, tá ið vit venja, og eg haldi, at tað gongur væl, sigur Todi Jónsson á heimasíðu sínari.

Hann skuldi í gjár verða við eykaliðnum hjá FCK, sum skal spæla ímóti FC Nordsjælland.

# Uppgávusavn á Lesandi.fo

**Nú ber til hjá næmingum og lærarum at finna sær góðan íblástur til ymiskt skúlaarbeiðið á Lesandi.fo, tí nú er uppgávusavn at finna á síðuni**

ÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Tørvur er á einum føroyskum uppgávusavnið við skúlauppgávum, sum eru viðkomandi fyri føroyska skúlan. Føroyskir næmingar hava annars brúkt danska uppgávusavnið »opgavecentralen.dk« sera nógv.

Um tú nýtir eitt tílíkt uppgávusavn við skili, kann hetta vera ein góð hjálp til bæði lærarar og næmingar. Men hetta setur eisini krøv, tí beinleiðis avskriving er hvørki gagnlig ella loyvd. Meiningin við savninum er at geva føroyskum næmingum atgongd til íblástur frá hvørjum øðrum til at arbeiða sjálvstøðugt.

Ætlanin er í fyrstu syftu, at tað verður frítt at leggja inn og taka niður uppgávur, seinni verður ein »stig skipan« sett inn, soleiðis, at tann, ið letur eina uppgávu inn, fær nøkur stig, sum viðkomandi síðani kann nýta til at taka aðra uppgávu niður. Ein uppgáva kann t.d vera ein stílur, rokniuppgáva, umseting o.a.

Vónandi verður fyrsta føroyska uppgávusavnið væl móttikið og nógv brúkt – við skili…

# Kommunur og ungdómur

NORØNAFELAGIÐ
*Tíðindaskriv*

Broytingar í kommunum og luturin hjá teimum ungu í vinarbýasamstarvinum eru evnini á vinarbýarstevnuni í Kalmar í Svøríki vikuskiftið 6. til 8.august í ár.
Á skránni eru eisini víðkanin hjá ES og hvussu hon ávirkar vinarbýasamstarvið, og góð dømi um vinarbýasamstarv í Norðurlondum verða tikin fram.

Føroyingar eru sjálvandi vælkomnir at vera við. Freistin at boða frá er til 1. juni. Luttøkan kostar 1.500 kr. umframt innivist og ferðina aftur og fram.

Umsóknarblað fæst hjá Norrøna Felagnum í Føroyum, J. Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn, tlf. 217999.

Norrøna Felagið hevur aðalfund í Jákupsstovu, J. Paturssonargøtu 24, mikudagin 31. mars kl. 20.00. Millum annað nevndarval er á skránni.





*Europeiski felagsskapurin OECD, hevur ásett játtan á 3% av landsins bruttotjóðarúrtøku at vera minstamark til gransking, og peningur til gransking í Føroyum verður mettur at vera undir einum prosenti av BTÚ. – Føroyar eru fullkomiliga afturúrsigldar, og skerjingarnar til gransking í fíggjarlógini 2004 er enn eitt fet skeiva vegin, sigur Rúna Hilduberg, stjóri á Granskingarráði Føroya*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Føroyska granskingarøkið afturúrsiglt

**Tá nýggja fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 í seinastu viku varð viðgjørt í tinginum, kom ferð á kjakið um gransking í Føroyum, sum hevur verið fyri stórum skerjingum. – Meðan øll grannalond okkara og vesturheimurin satsa alt meiri uppá gransking, eru Føroyar fullkomiliga afturúrsigldar uttan nakran reyðan tráð, yvirornaða samskipan og endamál, og vit kunnu als ikki luttaka í ES og OECD høpi, sigur Rúna Hilduberg, stjóri á Granskingarráði Føroya**

GRANSKING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eitt av mest nýttu og dominerandi orðunum undir valstríðnum í januar var orðið gransking. Vallyftini vórðu gylt um menning og játtanir til granskingarøkið í Føroyum, og t.d. gav núverandi løgmaður og flokkur hansara til kennar ynskini at menna og samskipa føroyska gransking.

### Skerjing á 720.000 krónur

Men í fíggjarlógini 2004, sum júst er løgd fram í tinginum, er talan um alt annað enn høgar raðfestingar og játtanir at menna føroyska granskingingarøkið. Stjórin í Granskingarráði Føroya, Rúna Hilduberg, er sera vónbrotin um og misnøgd við lágu raðfestingarnar og vantandi viljan til menning, gransking hevur verið fyri í nýggja fíggjarlógarupp skotinum.

Rúna sigur, at hetta er eitt stórt afturstig, og hava Føroyar beina kós mótsættan veg sum grannalond okkara. Granskingarráð Føroya, sum hoyrir undir Mentamálaráðnum, er mannað av umboðum úr øllum aðalráðunum og virkar sostatt sum eitt regnskjól fyri gransking kring landið, og hevur ráðið tvær játtanir á fíggjarlógini. Eina fyri grunnin, sum játtar pening til verkætlanir, og eina til ráðið, sum umsitur grunnin og er politiskur ráðgevi.

- Grunnurin er skerdur við eini hálvari millión, meðan ráðið er skert við 220.000 krónum, og við hesum fíggjarliga grundarlagi kunnu vit ikki avrika nakað munagott fyri samfelagið, sigur Rúna Hilduberg. Í nýggja fíggjarlógaruppskotinum hevur granskingargrunnurin fingið 4,7 milliónir játtaðar, meðan ráðið hevur eina millión at arbeiða við.

### Umsóknir fyri 22 milliónir

- Gransking er og verður altíð kostnaðarmikil, og t.d. kostar tað millum hálva aðru og tvær milliónir at fíggja eina Ph.d. útbúgving. Skulu vit upp á altjóða støði í Føroyum, mugu vit hava munandi meiri pening játtaðan, og í løtuni hendir júst tað mótsætta, staðfestir Rúna Hilduberg. Stjórin í Granskingarráðnum vísir á, at eftirspurningurin, viljin og evnini eru til staðar at granska í Føroyum, men við skerdum játtanum liggur alt lamið.

- Í fjør fingu vit 30 umsóknir, sum tilsamans kostaðu 22 milliónir, har útbúgvin fólk og feløg søktu um stuðul at granska bæði í almennu og privatu vinnuni, sigur Rúna Hilduberg. Men orsakað av vantandi peningi fáa flestu áhugaði eitt blankt nei, tí politiski myndugleikin játtar so lítið til gransking.

Verður blaða ígjøgnum fíggjarlógina 2004, er skjótt at síggja, at stórar skerjingar eru framdar á granskingarøkinum. Peningur til fiskivinnu- og havbúnaðarroyndir er skerdur, og saman við Fróðskaparsetri Føroya eru játtanir til økisgranskingarstovnarnar í Klaksvík og Suðuroy eisini skerdir munandi.

### Føroyar langt frá OECD krøvum

Rúna Hilduberg vísir á, at europeiski felagsskapurin fyri fíggjarligum og menningarligum arbeiði, OECD, hevur ásett játtan á 3% av landsins bruttotjóðarúrtøku at vera minstamark til gransking, og hóast eingi neyv tøl fyriliggja í Føroyum, verður peningurin til gransking í Føroyum mettur at vera undir einum prosenti av BTÚ.

- Tískil eru Føroyar fullkomiliga afturúrsigldar samanborið við grannalond okkara, og t.d. er Ísland eitt gott dømi um, hvør vinningur kann fáast, um gransking verður raðfest, sigur Rúna Hilduberg. Saman við Íslandi eru bæði Noreg, Finland og Svøríki komin upp um tey 3%.

Granskingarráðið hevur nógvar funktiónir. Umframt at vera politiskur ráðgevi hevur ráðið fingurin á pulsinum í ES granskingarhøpi, ráðstevnur verða samskipaðar og uppskot verða støðugt gjørd til politiska myndugleikan at samtykkja. Men sannleikin er sambært Rúnu, at Føroyar als ikki ganga ES og OECD krøvunum á møti.

- Hóast vit hava gjørt eitt greitt uppskot at samskipa og menna føroyskan granskingarpolitikk, hava vit ongan møguleika at menna og realisera hann, tá eingin peningurin verður játtaður, staðfestir Rúna Hilduberg. Hon saknar eitt felags stev, ein reyðan tráð, samskipan og nøkur yvirornaði endamál á granskingarøkinum.

- Í løtuni liggur øll gransking spjadd í fleiri aðalráðum, og verkætlanirnar eru so lítlar og atskyldar, at eingi úrslit síggjast. Í staðin skuldu vit málrættað farið undir størri verkætlanir, sum uttan iva høvdu førleikament føroysku tjóðina bæði mentanarliga og vinnuliga, sigur Rúna Hilduberg.

Men sum gongdin og rákið í føroyska granskingarpolitikkinum hevur verið í nýggja fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004, tykist bert ganga skeiva vegin, og uttan pening kann einki avrikast, hóast vilji og eftirspurningur frá útbúnum fólki støðugt er til staðar.

Sambært stjóranum í Granskingarráðnum mugu radikalar broytingar til, um Føroyar í framtíðini skal kunna standa seg í beinhørðu kappingini á altjóða marknaðinum, og uppgávan gerst alsamt torførari, tá kappingarneytar okkara alsamt mennast og styrkjast við støði í einum miðvísum granskingarpolitikki, sum støðugt fær størri og størri játtanir á fíggjarlógunum.

Viðmerkjast skal, at tað ikki eydnaðist okkum at fáa viðmerkingar frá politiska myndugleikanum um granskingarpolitikkin í Føroyum, skerjingarnar á fíggjarlógini o.s.fr. Vónandi verður hetta gjørligt í næsta blaði

**hís**